Dagfesting: 05. juni 2024

J.nr.

Skrivað hevur:

# ÚTBOÐSBRÆV

LEIGUMÁL TIL Fuglafjarðar kommunu

– ÁHEITAN UM AT GEVA TILBOÐ

1

1.0 ÚTBJÓÐINGARTILFAR

Útbjóðingartilfarið er sammansett av:

/ Skjal A. Hesum útboðsbrævi (05.06.2024)

/ Skjal B. Leigusáttmáli (frymil hjá Landsverki)

Fuglafjarðar kommuna leitar eftir nýggjum hølum til vegadeildina.

Við hesum verður alment lýst eftir møguligum leigumáli til virksemið hjá vegadeildini hjá Fuglafjarðar kommunu.

Vegadeildin hevur um hendi amboð og útgerð til umvæling og viðlíkahald av vegakervinum í Fuglafjarðar kommunu.

Leigumálið kann vera í bygningi fyri seg ella í parti av bygningi, ið er væl egnaður, og nýtslan annars samsvarar við virksemið hjá vegadeildini. Ætlaða leigumálið kann fevna um nýggjan, útbygdan ella umvældan bygning.

2

2.0 STAÐSETING

Ætlaðu hølini skulu vera lætt atkomulig og staðsett í Fuglafjarðar kommunu

3.0 LÝSING AV VIRKSEMINUM OG HØLISTØRVI HJÁ Vegadeildini hjá Fuglafjarðar kommunu

Verandi støða

Vegadeildin hevur í hyggju at flyta og samla sítt virksemið í Fuglafirði skjótast gjørligt og ynskiligt er at gera avtalu um nýtt leigumál áðrenn summafrítíðina 2024 ella skjótast tilber eftir hetta.

**Lýsing av virksemi og hølistørvi:**
Í vegadeildini hjá Fuglafjarðar kommunu starvast í løtuni 4 starvsfólk. Pláss má gjarna vera fyri fýra starvsfólkum aftrat. Í minsta lagið eitt starvsfólk skal hava egna skrivstovu.

**Goymslupláss**

Goymslupláss má vera til áleið 500 fermetrar í alt, harav í minsta lagið 200 fermetrar skulu vera innandura. Gólvið má tola ferðslu og vekt av tungum útbúnaði. Høllin má hava í minsta lagið 1 høga garaguhurð á 4,5 metra hædd og tilsvarandi breidd.



Uttandura goymsluplássi má vera lætt atkomuligt við tilfarið og maskinum. Undirlagið má vera fast.

**Felagshøli**
Tørvur er á einum felagshølið til í minsta lagið 8 persónar. Felagshølið skal hava thekøk og vera egna sum uppihaldsrúm/pausu rúm. Somuleiðis skal vera gjørligt við køluskápi eins og vask má vera til staðar.

Hølir:
2 skrivstovur á á leið 15 m2 hvør

2 x wc v/brúsumøguleikum til starvsfólk

Skiftirúm til ávíkavist kvinnur og menn

Møguleiki fyri at leigarin installerar vaskimaskinu/turkitrumlu ella hitaskáp

Fyrimunur er, um starvsfólk sleppa av við gravskitin klæðir í sjálvstøðugum skiftiplássið.

Leigarin nýtir egið innbúgv.

Dentur verður eisini lagdur á góð parkeringsviðurskifti til viðskifta- og starvsfólk. Ynski er 4-5 p-pláss, og 1 pláss til rørsluðtarnaði, um annað alment parkeringsøki ikki er nærhendis. Hølini skulu lúka galdandi myndugleikakrøv (BK17), herundir um brunatrygd og atkomuviðurskifti hjá rørslutarnaðum.

Ynskiligt er, at bygningurin verður hitaður av varandi orkukeldum.

4

4.0 TILGONGD, TÍÐARÆTLAN, SPURNINGAR OG RÆTTINGARSKRIV

**Fasa I**

Áhugaðir tilboðsgevar/útleigarar skulu gera vart við sín áhuga í seinasta lagið 13. juni 2024 kl. 14.00 umvegis teldupost til

lillianj@fuglafjordur.fo

Í fráboðanini skal stutt greiðast frá:
/ staðseting
/ stødd og møguleikar fyri innrætting á leigumáli
/ atkoma
/ parkering
/ nær leigumálið væntandi kann vera tøk

**Fasa II**

Tá freistin er farin, tekur Fuglafjarðar kommuna støðu til, hvørji uppskot farið verður víðari í samskifti við.
Samskiftið fer fram við útleigarar um at fáa neyvari lýsing av, hvussu møguligt leigumál kann vera skipað og innrættað.
Henda fasan tekur væntandi 1-2 vikur, og verður vanliga talan um 1 fund við hvønn áhugaverda tilboðsgeva.
Síðani verður ásett ein freist, har tilboðsgevarar fáa høvi til at lata endaligt tilboð inn, ið viðvíkur leigukostnað, lýsing av leigumálinum og tíðarætlan. Tilboð skulu vera latin inn umvegis teldupost.

**Fasa III**

Fuglafjarðar kommuna viðgerð innkomnu tilboðini og velur mest hóskandi tilboðið at fara víðari í samráðingar við.
Støða verður tikin út frá eini samlaðari meting av góðsku av leigumáli, staðseting, innrætting (ella møguleikum
fyri at innrætta), leigukostnað, parkeringsviðurskiftir, orkuloysn og -kostnað, tíðarætlan fyri yvirtøku av leigumálinum.
Langtíðarleigusáttmálil skal góðkennast av Fuglafjarðar býráð.

5.0 LEIGUSÁTTMÁLI
Leigumálið verður gjørdur yvir eitt fimm ára tíðarskeið, og kann ikki uppsigast av útleigara og leigara í eitt avtalað tíðarrúm, frá byrjan av leigumálinum.
Til leigumálið verður nýttur leigusáttmáli, sí skjal B:
6.0 FREIST, IÐ TILBOÐIÐ STENDUR VIÐ / GILDISTÍÐ Á BOÐUM
Treytað av neyðugari játtan, verður sáttmáli undirskrivaður, og skulu boð standa við til og við 1 viku eftir, at býráði hevur samtykt sáttmálan.
7.0 KRØV
Fráboðanir og tilboð kunnu latast inn á antin føroyskum ella donskum.
Fráboðanir um møgulig leigumál (fasa I) og tilboð (fasa III) skulu lúka tey krøv, sum standa í útboðstilfarinum.

Vit gleða okkum at frætta frá tykkum